

www.oljan.fo

**Jan Müller** 04 - 01 - 2013

# Transocean bót fyri flógvavanlukkuna

Í gjárkvøldið varð sveisiska felagið Transocean Deepwater dømt at gjalda 1,4 milliard dollarar í bót fyri sín lut í teirri stóru oljuvanlukkuni í Meksikoflógva í 2010. Sveisiska felagið átti boripallin Deepwater Horizon, sum felagið hevði leigað bretska BP. 11 mans doyðu, tá pallurin sprongdist, og ta næstu tíðina runnu 4,9 milliónir tunnur av ráolju út í havið og elvdu til ovurstóra dálking í grannalagnum. Amerikanska løgmálaráðið segði í gjárkvøldið, at Transocean hevur viðurkent at hava brotið lógina um dálkingarávaring, og at felagið var gingið við til at rinda 1,4 milliard dollarar í sekt. Nú er bara eftir at fáa rættin at góðkenna sektina. Amerikanska stjórnin hevur fyrr sagt, at vantandi trygdarskipanir hjá Transocean og BP elvdu til vanlukkuna. Fyri tveimum mánaðum síðani játtaði BP at rinda 4,5 milliardir dollarar í bót og skaðabót. Hetta er tann størsta sektin, sum nakað vinnufelag hevur fingið í USA.